VIÐMERKINGAR

# Bussleiðin

**Birgir Sondum**
*X við lista E*



Bussleiðin hevur nú koyrt í 26 ár. Ætlanin við Bussleiðini var at fólk í størri mun fóru at nýta henda møguleika, fyri at minka um privatu bilferðsluna.

Tað hevur verið trupult at vant fólk til at nýta tað almennu ferðsluna á veganetinum.

Tí má nýhugsan til í samband við bussleiðina.

T.d. styttri millum túrarnar.

Børn og pensionistar koyra ókeypis. Eg veit væl, at hetta hevði kostað kommununi, men bert í fyrstu atløgu.

Fyrimunirnir eru minni trýst á vegirnar, minni trýst á p–økini, nógv minni viðlíkahald av veganetinum og ikki minst minni dálking av umhvørvinum.

# Fleiri súkklubreytir

**Hans Albert Hansen**
*Hoyvík*
*Valevni sambandsfloksins*
*www.hansalbert.com*



Tann nógva ferðslan úr Hoyvíkshaganum um morgnarnar er til ampa fyri tey, ið ganga og súkkla. Nógv foreldur tora illa at lata børn síni fara til gongu ella á súkklu yvir í Hoyvíkar (S?)skúla, hóast Hoyvíkshagin er vælegnaður til bæði, tí hann er so slættur. Tað skulu ikki stórar íløgur til, fyri at gera farleiðina hjá hesum báðum bólkum nógv tryggari. Gonguteigar skulu gerast um allar vegir, ið ganga út á Vegin Langa og ljós eigur at varpast á hesar, tí ilt kann vera at síggja tey ferðandi í myrkri. Eitt dømi um hetta er gonguteigurin um Løgmannabreyt. (dømi: gonguteigurin um Løgmannabreyt). Súkklubreytir eiga somuleiðis at verða gjørdar eftir øllum teimum stóru vegunum, (Flatarvegi, Djúpagilsvegi, Løgmannabreyt og Klingluni) ið ganga út á Vegin Langa, samstundis sum súkklubreyt eigur at verða gjørd eftir Vegnum Langa. Súkklubreytirnar kunnu gerast serskildar ella sum partur av gongubreytini, har ein strika skilur gongubreytina frá súkklubreytini. (eins og á R.C. Effersøesgøtu). Um hetta verður gjørt, fara óivað fleiri børn at ganga og súkkla í skúla og hevði hetta samstundis lætt um ferðslutrýstið nærhendis Hoyvíksskúlanum um morgnarnar. Súkklubreytir eiga eisini at verða gjørdar aðrastaðni í Havn har, sum hetta ber til, sum t.d. við teir størru vegirnar. Framyvir eiga súkklu- og gongubreytir at verða umhugsaðar í samband við nýggja vegagerð í kommununi.

# Ferðsla

**Charlotta á Váli Olsen**
*Valevnið Miðflokksins í Suðurstreymi*



Sum Havnin er voksin, er ferðslan vorðín ovurhonds stór. Tað er vorið soleiðis at bilarnir meiri ella minni hava yvirtikið býin. Gongur tú ein túr í býnum, mást tú alla tíðina ansa eftir bilunum. Vit eiga eina sokallaða gongugøtu í Havn, ja, eg má kallað hana "sokallaða", tí fyri mær er hon ikki meiri gongugøta enn aðrar gøtur. Eg kundi hugsa mær, at gongugøtan var "bilfrí", eins og í øðrum londum, at bert var av- og áskipan ein til tveir tímar um dagin, har bilar kundu koyrt vørur til handlarnir, annars eingir bilar í gøtuni. So hevði tú kunna hugna tær við at fari túr í gongugøtuni við børnunum, hugt í handlar, tosa við fólk o.s.fr., tað kanst tú ikki sum er, uttan ampa fyri bilunum.

Viðvíkjandi súkklubreytum undrar tað meg, tá kommunan hevur gjørt allar hesar nýggju vegirnar í býnum, at ikki er hugsa um súkklubreytir. Sjálv havi eg súkklu og børnini eisini, men satt at siga, tori eg ikki at fara út í trafikkin á súkklu, tí tú hevur ongan rætt, antin mást tú súkkla millum bilarnar ella millum fótfólki á gongubreytunum, tað kann ikki vera rætt!

Her má gerast nakað munagott, bæði við verandi vegir eins væl og nýggjar vegir.

Hetta vil Miðflokkurin arbeiða miðvíst fyri!

Set tí krossin við lista H ella eitt av valevnum tess!

# Undirsjóvartunnil millum Skálafjørðin og Havnina innan 5 ár

**Dánjal Petur Hansen**



So skjótt Norðoyatunnilin er komin ígjøgnum eiga vit at byrja uppá undirsjóvartunnilin millum Skálafjørðin og Havnina.

Landsins mynduleikar taka ikki hetta stigið.

Neyðugt er at kommunurnar kring Skálafjørðin standa saman um hesa verkætlan og longu nú í verki vísa tað handlikraft sum skal til, soleiðis at hesin undirsjóvartunnil er ein veruleiki innan 5 ár.

Framtíðar býarplanlegging og íløgur eiga longu nú at taka støði í hesi framtíð.

Framtíðin kemur ikki at sær sjálvum.

Vit mugu vilja framtíðina og velja framtíðina.

# Hvat við

**Egon Øregaard**
*Valevni Fólkafloksins til býráðsvalið í Havn*



Hvat við:

- Teimum samanløgdu,-minnu kommununum?
- Eldraøkinum?
- Frítíðar umstøðunum?
- Skúladeplinum - Mentanardeplinum?
- Vesturskúlanum ístaðin fyri Venjingarskúlan?
- Út- ella nýbyggingini av Argja skúla?
- Karmar til Musikkskúlan?
- Umhvørvinum?
- Karmar til vinnulívið?

Hetta eru nøkur av málunum, sum Fólkaflokkurin fer at loysa, í samstarvið við viðkomandi partar !

Samlaða kommunan fyrst.

# Hugsjónir í býráðið

**Jógvan Arge**
*býráðslimur*
*fyri Tjóðveldiflokkin*



Ert tú borgari í Tórshavnar kommunu, eigur tú at fara á val í dag.

Hetta er tín fyrsti og størsti møguleiki at ávirka viðurskiftini í okkara kommunu næstu fýra árini.

Listi E stendur fyri opinleika og virðing í viðurskiftunum millum kommununa og borgaran.

Fáa vit tín stuðul, fær borgarin fleiri møguleikar fyri ávirkan.

Vit hava sett okkum fyri at hoyra borgararnar í málum, sum viðkoma teimum.

Vit bjóða fram politikarar við hugsjónum heldur enn politikarar, sum ganga burtur í smálutum.

Tað er alneyðugt, tí stórmál eru fyri framman.

Kommunan umfatar nú allan Suðurstreym og nakað væl aftrat.

Nýggj heildarætlan má gerast fyri framtíðini.

Skúlarnir skulu dagførast.

Eldramálini mugu loysast og barnaansingin mennast.

Mentanin skal røkjast eins og ungdómurin og ítrótturin.

Vit seta trivnaðin í hásæti og hava umsorgan fyri umhvørvinum.

Ferðslan má skipast betur og Bussleiðin gerast eitt veruligt alternativ til bilin.

Samljóð má vera millum húsabygging, vinnumøguleikar og grøn øki.

Vit vilja fáa skil aftur á bygginguna í kommununi.

Vinnumøguleikarnir mugu á breddan.

Teir eru týðandi fortreyt fyri trivnaði okkara.

Vilt tú hava annað skil á býin, bygdir og oyggjar í Tórshavnar kommunu, velur tú Lista E.



VIÐMERKINGAR

# Barnaansing – karmarnir eru ikki alt

**Eyðgunn Samuelsen**
*valevni hjá Javnaðarflokkinum Klaksvíkar Býráð*



Tjaki og skrivingin nú til valið um "skúrloysnir" og "lappaloysnir" í samband við tey framstig, ið hóast alt, eru framd innan barnaansingina síðstu 4 árini, er fyri mær eitt sindur misskilt og kann tykjast niðurgerandi fyri tey starvsfólk, ið arbeiða innan ansingina og tey foreldur, ið hava síni børn í ansing.

Starvsfólkini í barnaansingini og dagrøktini gera eitt megnararbeiði og sjálvt um fáir námsfrøðingar eru, so eru vit í nógvum førðum millum tey fremstu innan námsfrøði í Føroyum, tí vit hava nakrar eldsálir, ið brenna fyri børnunum.

Somuleiðis eru flestu foreldur ikki í iva um, at teirra børn trívast, mennast og hava tað gott har tey vera ansaði. Flottir og dýrir stovnar gera ikki alt. Tað er umsorganin fyri børnunum og tað at tey fáa ein tryggan og mennandi gerandisdag ið telur mest.

**Klaksvíkin útbúgva pedagogar.**

Tørvurin á námsfrøðingum er í dag so stórur, at vit bert í Klaksvík hava tørv á fleiri 10 tals pedagogum. Klaksvíkar kommuna hevur, gjøgnum kommunusamskipanina, fleiri ferðir gjørt vart við hetta mótvegis myndugleikunum, uttan at tað ger nakran mun. Støðan í dag er tann, at 2 fólk úr Norðoyggjum vanliga vera upptikin í pedagogútbúgving fyri hvønn flokk ið byrjar á Læraraskúlanum og tað er alt ov lítið. Tað er ikki bert ein fíggjarligur spurningur at bert ein flokkur verður tikin upp hvørt árið, hølistørvurin á Læraraskúlanum er eisini ein forðing. Tí er tað sjálvsagt at onnur mugu bjóða seg fram, og als onki er í vegin fyri at Klaksvíkin kundi hýst einum flokki hvørt ár. Vit hava nógv væl útbúgvin fólk her norði ið kundu undirvíst og annars kundu lærarir, um neyðugt, ferðast í millum. Við 400 ansingarplássum í Klaksvík er heldur ongin trupuleiki við praktikplássum. Hetta eigur at vera nakað gjørt við í komandi tíðum.

# Undirsjóvartunnil millum Skálafjørðin og Havnina!

**Hans Jacob Lamhauge**
*valevni til Runavíkar kommunu*



Eitt mál, ið er komið fram í valstríðnum til hetta kommunuvalið, er verkætlanin um undirsjóvartunnil millum Skálafjørðin og Havnina. Verkætlanin er spennandi og kann, um rætt verður atborið, verða til stórt gagn fyri Skálafjarðarøkið.

Hetta er ein stór verkætlan, ið má fyrireikast væl. Talan er ikki bert um tunnilin, men eisini um ferðsluna til og frá hesum. Veganetið, líka úr Søldarfirði og út í Runavíkina, er als ikki fyrireikað, til at taka ímóti allari tí ferðslu, ið kann væntast í gjøgnum tunnilin.

Komandi býráð eigur tí at treyta sær, at tunnilin og vegurin til og frá hesum, verða viðgjød, sum eitt og sama mál.

Vit eiga at læra av mistakinum í Leirvík, í samband við Norðoyartunnilin.

Gott val!

# Hevur Elin etið seg um rygg á Mc Donalds!

**Páll á Reynatúgvu**
*borgarstjóri á Sandi*



Eftir øllum at døma hevur hon sogið sær mergin til úr hesi mentan, tí sjálvdan havi eg sæð so amerikaniseraðan og einoygdan retorikk festan á blað her í Føroyum.

Elin Lindenskov er so troytt av at hoyra fólk úr útjaðaranum loypa á Havnina, sigur hon í grein herfyri. Og tí loypi eg á útjaðaran, tykist hugburðurin at vera.

Lat ongan vera í iva um, at eg eri sera stoltur av og góður við okkara høvuðsstað, Tórshavn. Eg kenni býin sum mín, eins væl og tykkara, sum gista í Havnini hvørja nátt.

Og sjálvandi skal høvuðsstaðurin rúma nógv av teimum tilboðum, ið Elin so óført greiðir frá. Og eg eri samdur við Elini ið nógvum av tí ið hon førir fram. Tó eru tað økir har eg meti at Elin Lindenskov fer grundleggjandi av sporinum.

Tað er fyrst og fremst í útjaðaranum at vinnuligu frambrotini vaksa. Tak bara Faroe Marine Biotech á Eiði, ella høvdavirkið í Leirvík. Ella finn útav hvar mesti fiskurin kemur uppá land.

Tað er fyrst og fremst í útjaðaranum at mentanarligu frambrotini eru. Les Martin Joensen, Heðin Brú, ella lurta eftir Eivør Pálsdóttir og Sunnleifi Rasmussen.

Tað er fyrst og fremst í útjaðaranum at ítróttarligu frambrotini grógva. Norðingar hava verið framúr í at klekja fótbóltsstjørnur, meðan Havnin í storan mun sankar saman tað ið útjaðarin elur.

Tað er fyrst og fremst í útjaðaranum at ná́tturan vinnur á larminum. At veruleikin vinnur á "yvirfladiska resinum". At grønu føroyar vinna á asfaltinum.

Einki av hesum nevnda, bendir á ein miðaldarligan fundamentalistiskan hugburð í útjaðaranum, men ber boð um at útjaðarin framvegis er kveikjari og uppalari av góðum hugburði og sunnum føroyingum.

Havnin er sum allir høvuðsstaðir. Sankar saman ágoðan av tí nógva ið grør rundanum, og er før fyri at vinna pening burturúr tí tilfeinginum. Savningarstaður hjá tí mesta. Ikki minst av sosialum trupulleikum og víttgangandi átrúnaðarligum sektum.

Havnin er ikki dynamiska meginhjólið í føroyum í dag. Havnin er ein tungur fyrisitingarligur bygnaður, sum etur nógv av tí tilfeingi sum verður skapt og virkað í føroyska útjaðaranum. Tað hava fleiri kanningar víst seinnu tíðina.

Kortini eru vit góð við Havnina, tí hon er okkara høvuðsstaður. Men tað er ikki vist, og neyvan rímiligt at tann støðugt flótandi stuðulin frá útjaðaranum til Havnina fer at halda fram.

Uttan mun til hvussu nógv tú droymir um Mc, Elin,

"We want our peoples money back", Elin

# Ein góð kommuna

**Meta C. Palle**



Í dag skulu borgararnir í Tórshavnar kommunu seta teirra kross.

Um tað verður við mítt navn, skulu tit ikki ivast í, at eg fari at gera mítt besta fyri tykkum. Tí havi eg stillað upp.

Sum dømi um, hvat eg fyrr havið gjørt, kann nevnast, at tá ið talan var um at selja

Eysturskúlan, var eg við í tí foreldrabólki, sum arbeiddi ímóti sølnuni, sum síðani varð av ongum.

Somuleiðis var eg við í samráðingunum, sum tey 23 almennu fakfeløgini høvdu við Landsstýrið í 90-unum.

X við lista C.

# Ein góð kommuna fyri øll

**Guðrun Malena Hansen**



Gøtubygd skal vera staðið, har øll eru glað fyri at búgva.

Vit, sum búgva í gøtubygd, skulu fáa børnini ansaði í barnagarði og frítíðarskúla.

Skipanin virkar væl, tó har skal allatíðana arbeiðast við at betra um umstøðurnar, so tær verða optimalar.

Skundast skal undir bygging av bygdarhúsið við nógvum møguleikum, har rúm er fyri ítrótti og mentan.

Útstykkjan av grundøkjum í Norðragøtu, Sydrugøtu, við Gøtugjógv og Undir Gøtueiði ( Tað skal altíð vera skjótt at fáa grundstykki í Gøtu Kommunu.)

Skúlin skal gerast meira nútíðarhóskandi.

Skipaður flutningur av skúlabørnum í øllum flokkum ímillum bygdirnar( soleiðis at børn í 1, 2, og 3 flokki í øllum førum hava møguleika fyri at koyra til og frá við skúlabussinum. Helst skuldu øll havt henda møguleika

Eldrasambýlið er nú gjørt og skal viðlíkahaldast. Tey eldru skulu hava áhugavert ítriv, sum gevur teimum innihald í gerðandisdegnum.

Undirhúsið á kajuni í Nordragøtu eigur at vera eitt sjálvsagt tilboð.

Frítíðarvirksemi fyri ung og eldri.

Fríðka um Gøtu bygd og gera vetrarfriðingina lidna. Kanska miðja ímóti at vinna heitið reinasta bygd í Føroyum.

Fríðka um fram við ánni, við vøllin og allan vegin inn í dalin. Eisini í hinum bygdunum.

Hampa um og gera umstøðurnar betri á Syðrugøtusandi, nú so stór og frálík tiltøk eru har.

Gøta er ein vinnulívsbygd burturav, og tí skal vinnan hava bestu møguleikar at virka. Hetta krevur góð havnaviðurskifti og rúmligt ídnaðarøki.

Nútíðin krevur samstarv tvørtur um kommunumark. Hetta er galdandi fyri undirvísing, sløkkjulið, eldraøkið og serøkini t.d. ítriv.